


# Undirvísingargongd

# Barnafagnaður í Dundurdali
# og
# Vár í Dundurdali

©Rithøvundur og teknari: Astrid Lindgren og Ilon Wikland

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2007

Turid Vang Frederiksen |

© Nám

**Um bókina**

*Søgur úr Dundurdali* er um sjey børn, sum búgva í Dundurdali. Seks av børnunum eru beint undir skúlaaldur og um skúlaaldur og so er ein genta, sum er 2-3 ára gomul. Børnini spæla nógv og finna uppá alt ímillum himmal og jørð.

Tá ið børnini spæla og finna uppá hendir eitt sindur av hvørjum, og við hvørt skapar tað órógv í tað heila.

Trý hús eru í Dundurdali, í tveimum av teimum búgva tvey børn og einum búgva trý børn. Tey hava nokk so nógv djór, hestar, neyt, grísar, geitir, seyð, høsn, hundar og kettur. Børnini brúka eisini nógva tíð úti saman við øllum djórunum.

Tríggjar søgur eru í bókini, *Barnafagnaður í Dundurdali*, *Vár í Dundurdali* og *Jól í Dundurdali*.

Astrid Lindgren hevur skrivað søgurnar og Ilon Wikland hevur teknað. Tekningar eru á næstan hvørjari síðu og stuðla tekstinum væl, til tíðir er meira at síggja á tekningunum enn teksturin sigur frá.

Turid Vang Fredriksen hevur gjørt uppgávurnar. Hon brúkti tær í seinnu hálvu í 2. flokki og fyrru hálvu í 3. flokki. Lánitíðin til flokssett er seks vikur, og vit meta at væl ber til at koma ígjøgnum bók og uppgávur í lánitíðini.

**Uppgávur og arbeiðsgongd**

Í *Søgur úr Dundurdali* eru tríggjar søgur, og í heftinum eru uppgávur til tvær teirra *Barnafagnaður í Dundurdali* og *Vár í Dundurdali*.



Arbeitt verður fyrst við eitt sindur av undanvitan, áðrenn farið verður at lesa søgurnar. Søgan verður býtt í hóskandi partar og so verða uppgávur, sum hoyra til síðuna loystar.

Nærum øll svarini til uppgávurnar eru at finna á síðuni, sum er lisin. Eitt hugskot er at lesa alla søguna fyri næmingunum, áðrenn farið verður í holt við uppgávurnar, annars verður lagt upp til, at næmingarnir lesa sjálvir.

Uppgávurnar eru skipaðar sum einstaklingauppgávur, men tað ber væl til hjá næmingunum at arbeiða saman um uppgávurnar, t.d. kunnu tey arbeiða í bólki og hjálpast at við at lesa søguna og loysa uppgávurnar saman.

Eingi síðutøl eru í bókini, og tí eru myndirnar, sum eru á síðunum við í uppgávuheftinum, so til ber at síggja, hvørjum síðum arbeitt verður við.

© Nám

**Úr námsætlanini**

Uppgávurnar og arbeiðshátturin nema serliga við hesi faklig førleikamál fyri 3. floksstig:

- *at lurta, tá ið talað verður, og taka orðið eftir tørni í samrøðu*
- *at lurta eftir søgum og frásagnum*
- *at tosa um innihald og snið í léttari tekstum, herímillum hvussu orð og mynd virka saman í myndabókum*
- *at lesa hart og innantanna og brúka einfaldar avkodingar- og fatanarsnildir*
- *at lesa ymisk tekstsløg, ið hóska til førleikastøðið*
- *at vísa, at tað lisna er skilt, eitt nú við at tekna, skriva ella leggja fram*
- *at skriva orð og setningar við hond, nýta stórar og smáar bókstavir rætt og seta punktum*
- *at skriva upplivingar og stuttar søgur í tíðarrøð og við fjølbroyttum orðalagi*
- *at stava tey vanligastu orðini rætt at vísa kunnleika um høvuðsorðaflokkarnar, herímillum navnorð, sagnorð og lýsingarorð*
- *at vísa kunnleika um einføld málløruhugtøk, herímillum eintal, fleirtal, nútíð og tátíð.*

© Nám